# Sterkasta kvinna í Danmark á Ársins Leiðaradegi

LEIÐARADAGUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ein av høvuðsrøðarunum á Ársins Leiðaradegi, ið verður á Hotel Føroyum 23. januar, er Stine Bosse. Hon fer at tosa um, hvussu hon ætlar at stýra einum trygdarveitara ígjøgnum fíggjarkreppuna. Stine Bosse er nummar 40 av heimsins 50 máttmiklastu kvinnum.

Stine Bosse er forstjóri í Tryg og koncernstjóri fyri TrygVesta, ið er næststørsti útbjóðari av tryggingum í Norðanlondum. Hon hevur ábyrgd fyri 4500 starvsfólkum í fimm londum.

Stine Bosse telist millum heimsins mest máttmiklu konufólk í vinnulívinum. Tað heldur í øllum førum vinnublaðið Fortune Magazine, sum í september 2008 almannakunngjørdi sín árliga lista yvir 50 mest máttmiklu vinnulívskonufólk í heiminum.

Stine Bosse var sett á 40. pláss, og tað er fyrstu ferð, at danski konsernleiðarin er á listanum, har ovasti leiðarin hjá PepsiCo, indiska Indira Nooyi er nummar eitt. Eingin annar dani er millum 50 mest máttmiklu kvinnur.

At vera á listanum hjá Fortune er ikki einasti heiðurin, sum Stine Bosse hevur fingið her í heyst. Í august 2008 varð hon Riddari av Dannebrog og fyri lítlum mánaði síðani fekk hon háttmetta prísin hjá Lloyd's fyri sjónliga leiðslu.

Stine Bosse hevur arbeitt hjá Tryg, síðani hon gjørdist løgfrøðingur fyri 20 árum síðani. Hon hevur eitt nú verið deildarleiðari, starvsfólkaleiðari og starvsfólkastjóri.

Tað er felagið Synergi, ið skipar fyri Ársins Leiðaradegi. Tað ber til at lesa meiri um dagin og at tekna seg á heimasíðuni hjá Synergi – www.synergi.fo



Kommunusamskipanin:

## Landsstýrið niðurger okkara eldru borgarar

Kommunusamskipan Føroya er skelkað av teirri niðurgerð, sum landsstýrið sýndi okkara eldru borgarum við at taka allan stuðulin frá eldratilhaldunum.

Á fundinum hjá Kommunusamskipan Føroya í gjár var eisini málið um eldradagtilhaldini, sum nakrar dagar fyri jól mistu allan stuðulin frá landsstýrinum. Stýrið fyri Kommunusamskipanina er skelkað av teirri niðurgerð, sum landsstýrið sýndi okkara eldru borgarum, og mótmælir harðliga framferðarháttinum, har landsstýrið í veruleikanum steingir dagtilhaldini.

Eisini eftirlýsir stýrið í Kommunusamskipanini teirri kommissión, ið skal fyrireika ætlaða kommunureformin. Hóast at fleiri landsstýrismenn fyri kommunuvalið í fjør boðaðu frá, at kommissiónin var farin til verka, so er púrt einki hent enn.

- Eingin kommissión er sett, tiansheldur farin til verka, og hetta er ikki nøktandi, tá havt verður í huga, at alneyðugt er nú við einum kommunureformi, har kommunala sjálvræðið verður styrkt munandi, sigur Kommunusamskipan Føroyar.




